# Privatir handlað fyri meira enn tvær mia við almennari ogn

**- Tað er neyðugt, at stálið og biologiin møtast onkustaðni, har tað er optimalt at virka, segði Tórbjørn Jacobsen á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna**

FRAMLØGA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á framløguni í Vestmanna mánamorgunin kom fram, at privatir reiðarar hava selt skip og fiskiloyvi fyri meira enn 2 miljardir krónur, síðan vit fingu lógina um vinnuligan fiskiskap. Onkur nevndi eisini tøl, sum liggja væl hægri, kanska millum 2 og 4 miljardir krónur. Bæði Tórbjørn Jacobsen og Høgni Hoydal nevndu tøl sum 2 miljardir ella kanska hálva triðju miljard krónur.

- Handlað hevur soleiðis verið við almennari ogn, og vinningurin er farin í privatar lummar, sum teir søgdu.

Ein av lærarunum í Vestmanna spurdi, hvør hevur fíggjað hesi keyp, og hann spurdi eisini, um hesar sølur í seinasta enda kunnu fara at raka almenningin um bankarnar.

Høgni Hoydal helt fyri, at um alt fer á heysin, verða bankarnir raktir, og tá verður almenningurin onkusvegna eisini raktur.

- Vit hava kanska goldið fyri henda flotan einar 4-5 ferðir. Hetta eru í fleiri førum somu skip og loyvir, sum eru handlað, legði hann aftrat.

Tórbjørn Jacobsen segði, at skriðan leyp, tá politiski myndugleikin fór at góðtaka, at fiskiloyvir gerast handilsvøra millum privatar.

- Men hetta er stutttíðarhugsan, tá tú hevur við fiskivinnu at gera. Tað nyttar so lítið at vera ríkur í dag – uttan at hugsa um, hvussu morgindagurin sær út, segði hann.

## Studningstrýst

Tórbjørn nam eisini við trýstið, sum var á politisku skipanina í fjør summar, tá oljan gjørdist so óvurhonds dýr.

- Henda støða legði eitt gigantiskt trýst á politikararnar. Reiðarar vildu hava oljustuðul, og teir vildu eisini sleppa at selja fiskin uttanlands – uttan um okkara fiskamarknað.

Løgtingsmaðurin helt fyri, at høvdu politikarar tá hoykna og fóru at lata oljustuðul, hevði skriðan lopið av álvara.

- Tað vóru politikarar, sum tá høvdu ætlanir um at lata oljustuðul, men tað hevði verið púrasta burtur við at farið inn í ta jungluna aftur, sum Tórbjørn Jacobsen tók til.

Hann vísti á, at tað eydnaðist at steðga stuðulsætlanini við, at politiski myndugleikin tók prát við skilafólk, og í hesum sambandi nevndi hann eisini nú Atla Gregersen, Jørn Astrup Hansen og Sonju Jógvansdóttir.

- Tey slerdu so mikið av køldum blóði í politiska myndugleikan, at landsstýrið vendi sær frá hesi ætlan.



*- Lobby-arbeiði hjá stórum kapitaláhugamálum er mangan so sterkt, at hetta skjótt kann yvirrenna eina politiska skipan. Hetta síggja vit kring um heimin, sum nú er sendur út í eina fíggjarliga vanlukku, segði Tórbjørn Jacobsen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Stál og biologi

Tórbjørn Jacobsen segði, at lobby-arbeiði hjá stórum kapitaláhugamálum mangan er so sterkt, at hetta skjótt kann yvirrenna eina politiska skipan, sum hann tók til.

- Hetta síggja vit kring um heimin, sum nú er sendur út í eina fíggjarliga vanlukku.

Løgtingsmaðurin vísti eisini á tilmælini hjá ICEC, sum í 2008 vóru, at eingin toskur og hýsa verður veidd á føroyska landgrunninum.

- Vit kunnu ikki steðga allari fiskivinnu í Føroyum, tí annars steðgar alt upp. Tí kom Fiskirannsóknarstovan við eini "moderatari" tilráðing, sum eitt nú mælti til at skerja veiðina eftir toski og hýsu við 50%, umframt at gevast við vinnuligari veiði innanfyri 3 fjórðingar.

Tórbjørn Jacobsen segði, at orsøkin til, at tilmælini vóru so drastisk, sum hann tók til, er, at ov lítið er gjørt við stovnsrøktina árini frammanundan.

- Vit hava arbeitt nokso leingi við uppskoti um reguleringar, so fiskiveiðiskipanin aftur kann gerast sjálvregulerandi. Tað er neyðugt, at stálið og biologiin møtast onkustaðni, har tað er optimalt at virka, legði løgtingsmaðurin aftrat.

